## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og fyrrapartin regn, men seinnapartin yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og regn av og á, men eisini sólglottar. Hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og regn, seinnapartin strúkur í vindi av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin upp í hvassan vind av útsynningi og vestri og ælingur, partvís vátaslettingur. Hitin millum 2 og 5 stig. Sunnudagin upp í skrið av norði og kavaælingur. Hitin fellur niður í ÷2 til ÷5 stig.

# Kvinnur duga líka væl sum menn

**Hervør Heinesen av Skála fór í starvsvenjing á bilverkstað fyri at prógva, at kvinnur eins væl og menn kunnu um væla bilar**

SKITIÐ ARBEIÐI
*Kirstin Johansen & Malan Petersen*

16 ára gamla Hervør Heinesen av Skála er í starvsvenjing hjá Berg Motors í Havn, har tey selja og umvæla Mazda persónbilar og Scania lastbilar og bussar.

Tað er kanska eitt sindur óvanligt, at ein genta fer á eitt bilverkstað, men Hervør dámar væl at fjasa vil bilar og tílíkt.

Hon valdi at fara har, tí hon vildi prøva okkurt nýtt og øðrvísi.

- Eg vil prógva, at kvinnur eins væl og menn kunnu arbeiða á einum bilverkstað. Eg haldi ikki, at menn kunnu meir enn kvinnur á hesum økinum. Men tá tað kemur til at lyfta og flyta okkurt tungt, er gott at hava eitt mannfólk til staðar.



*Hervør Heinesen hevur verið eftir einum útstoyti á goymsluni hjá Berg Motors í Havn, har hon er í starvsvenjing. Hóast hon ikki heldur, at hetta verður hennara yrkisleið í framtíðini, so heldur hon, at kvinnu eins væl og menn kunnu umvæla bilar*
*Mynmd: Jens Kristian Vang*

Hervør er m. a. sloppin at pussa og skrúva bilar sundur og saman. Henni dámar væl á Berg Motors, hóast hetta neyvan gerst hennara arbeiði í framtíðini.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷12 |
| Nuuk | ÷5 |
| Qaqortoq | 1 |
| Ammassalik | ÷4 |
| Saint John's | ÷3 |
| Halifax | 0 |
| Reykjavík | 3 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 3 |
| Lerwick | 4 |
| Aberdeen | 6 |
| London | 8 |
| Tromsø | ÷6 |
| Bergen | 0 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 0 |
| Keypmannah. | 3 |
| Helsinki | ÷11 |
| Moskva | ÷4 |
| Berlin | 0 |
| Warzawa | ÷1 |
| Kiev | ÷2 |
| Bukarest | 1 |
| Paris | 4 |
| Madrid | 8 |
| Róm | 9 |
| Malorca | 12 |
| Athen | – |
| Malta | 18 |
| Tunis | – |
| Beijing | – |
| New Dehli | 16 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | – |
| New York | ÷3 |
| Miami | 21 |
| Los Angeles | 14 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 30 |
| La Paz | 9 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 29 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 971 hPa. sunnan fyri Hvarvið fer í landnyrðing og hitabrúgvin haðani verður yvir Føroyumm mikunáttina.




Lágtrýstið vestan fyri Skotland fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum hósnáttina.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 19/01 kl. 06⁰⁰– 20/01 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 4,6°
Minsti hiti máldur í jan.: ÷8,8° - Mesti hiti máldur í jan.: 11,6°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 3,0 mm – mált frá 19/01 kl. 06⁰⁰–20/01 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í januar: 121,9 mm

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

GEVIÐ BLÓÐ

BLÓÐBANKIN
Telefon 311397

## VESTFALLSKYRRINDI

19. januar: Mánin næstur jørðini
21. januar: Tendring

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 21. jan | 05.54 | 18.25 | 04.54 | 17.25 | 05.09 | 17.40 | 07.54 | 20.25 | 08.54 | 21.25 | 04.09 | 16.40 | 03.09 | 15.40 | 06.09 | 18.40 | 07.09 | 19.40 | 05.39 | 18.10 | 06.54 | 19.25 |
| 22. jan | 06.55 | 19.25 | 05.55 | 18.25 | 06.10 | 18.40 | 08.55 | 21.25 | 09.55 | 22.25 | 05.10 | 17.40 | 04.10 | 16.40 | 07.10 | 19.40 | 08.10 | 20.40 | 06.40 | 19.10 | 07.55 | 20.25 |
| 23. jan | 07.52 | 20.19 | 06.52 | 19.19 | 07.07 | 19.34 | 09.52 | 22.19 | 10.52 | 23.19 | 06.07 | 18.34 | 05.07 | 17.34 | 08.07 | 20.34 | 09.07 | 21.34 | 07.37 | 20.04 | 08.52 | 21.19 |
| 24. jan | 08.44 | 21.09 | 07.44 | 20.09 | 07.59 | 20.24 | 10.44 | 23.09 | 11.44 | — | 06.59 | 19.24 | 05.59 | 18.24 | 08.59 | 21.24 | 09.59 | 22.24 | 08.29 | 20.54 | 09.44 | 22.09 |

5 707265 100036 >